# Info til skótar

**Innihald**
Á Nordic Adventure Race verða skótarnir deildir í blandaðar patruljur, har tær ymsu mentaninar møtast í spennandi avbjóðingum. Her er samskifti og samstarv avgerandi fyri, hvør gerst vinnari.

Luttakararnir hava vaksnar fyriskiparar, leiðarar og ISTarar (18+) við sær allan vegin.
Sum luttakari á hesum allarfyrsta Nordic Adventure Race í Føroyum ert tú, saman við hinum skótunum, ein partur av einum stórum norðurlendskum felagsskapi og eftir leguna verður tú vónandi fleiri góð minnir og góðar upplivingar ríkari.

Hóast leiðarar, ISTarar og fyriskiparir altíð eru við tær, skalt tú og tín patrulja avbjóðast og gerast sjálvstøðug í tykkara arbeiði. Tú fert tó altíð at hava samband við aðrar skótar, eisini skótar, ið eru føroyingar, hóast hesir neyðturviliga ikki eru í tíni patrulju.
Allar patruljur hava 1 leiðara tengdan at sær og hesin leiðarin fylgist við patruljuni fyri tað mesta, tá vit ferðast runt á oyggjunum.

**Krøv til luttakandi skótar:**

Aldur: Tú ert millum 13 og 16 ára gamal/gomul.

**Fysikkur:**
Nordic Adventure Race er ein avbjóðandi lega, har vit ferðast nógv. Tí er tað týdningarimikið, at tú hevur góða kondition. Tú skalt bera tín egna ryggsekk, umframt patruljuútgerð og tað verður væntað av tær, at tú megnar hetta.

**Prísur:**
Prísur fyri luttakandi føroyskar skótar er 1.900 kr.